# tjórnarflokki Íslands



*Her setir íslendski forsætisráðharrin, Geir H. Haarde, 37. landsfundurin hjá Sjálfstæðisflokknum, sum varð hildin í Laugardalshøllini í Reykjavík 12. apríl*

í samfelagnum. Jón Þorláksson (ið sum áður nevnt var fyrsti formaður í flokkinum) helt upp á, at politikkur átti, sum hann málbar seg, at byggja á hugsjónir og ikki stætta og seráhugamál (kortini hevur hesin skilnaður millum politikk og stætta- og seráhugamál yvirhøvur verið sjónskari í orðum enn í verki).

Harafturat kemur, at flokkurin hevur eitt tætt tilknýti til íslendskt vinnulív (so tætt, at forherðingar viðhvørt hava kallað hann »politiska veingin hjá ognaraðalinum«). Tilknýtið til vinnulívið hevur knæsett ta seiglívaðu ímynd í íslendska almannahugsan, at flokkurin eigur eitt búskaparskil, sum Guð ikki unti mótstøðuflokkunum, serliga ikki teimum vinstrahallu (spurningurin, um veljarin skal tora at líta vinstraflokkum íslendska búskapin í hendur, hevur eisini longu fleiri ferðir verið á lofti í hesum valstríðnum).

Fyri teir ungu veljararnar hevur tað helst eisini sítt at siga, at ymsir knastar í hugmyndafrøðini hjá flokkinum kaldakrígsárini (og summir ljótir) spakuliga eru bryndir av, síðani múrurin fall. Í lívsvirðisspurningum er flokkurin yvirhøvur frílyntur. Eitt nú legði formaðurin og núverandi forsætisráðharri sjálvur annar fram uppskot fyri Altingið um skrásett parlag og rættin hjá samkyndum at ættleiða børn. Uppskotið varð samtykt í juni í fjør.

## 16 ár við stjórnvølin

Nú íslendingar skulu á val aftur, hevur Sjálfstæðisflokkurinn sitið í stjórn samfelt í sekstan ár. Eru veljarakanningarnar teir seinastu mánaðirnar eftirfarandi, er flokkurin nógv størsti flokkur í Íslandi í løtuni. Ein veljarakanning, sum varð gjørd fyri Fréttablaðið 15. apríl, gav Sjálfstæðisflokknum rúmliga 43 prosent av atkvøðunum. Næststørsti flokkur í kanningini Samfylkingin (íslendski javnaðarflokkurin) ætlaðist fáa um 22 prosent av atkvøðunum. Og tað er helst ikki av ongum, at Sjálfstæðisflokkurinn stendur seg væl í veljarakanningunum. Hesin sekstan árini hann hevur sitið við stjórnarábyrgd hava uttan iva verið besta vakstrartíð búskaparliga í íslendskari søgu nakrantíð. Í eini frágreiðing, sum Hagstofa Íslands almannakunngjørdi herfyri kemur fram, at heildarinntøkurnar í húsarhaldsgeiranum vuksu 183 prosent í tíðarskeiðnum frá 1994 til 2005. Í sama tíðarskeiði er tøk inntøka hjá húsarhaldum vaksin 149 prosent og keypsorkan (príslagsbroytingar og fólkavøkstur tikin við) 56 prosent upp á fólkið.

Hesum framburðurin, sum allastaðni sæst aftur í íslendska samfelagnum, ber Sjálfstæðisflokkurinn eyðvitað ikki æruna av einsaømallur. Tað eru fyrst og fremst broytingarnar í viðurskiftunum við umheimin og kanska serliga tær broytingar, ið EBS-sáttmálin hevur havt við sær, ið hava flutt snarið. Við EBS-sáttmálanum, ið varð endaliga frágingin fyrst í nítiárunum, gjørdist Ísland partur av innara marknaðinum í ES. Síðani er búskapurin farin ígjøgnum eitt umskifti, ið hevur loyst hann úr teimum høftum, hann hevði ligið í heilt aftur í trýatiarini. Fyritøkur, sum áður vóru heilt ella partvíst í almennari ogn, eru einskildar eitt nú telefonverkið (Landssímin), bankarnir o.s.fr. Tiltøk hava verið gjørd til at fremja kapping í vinnulívinum, til at greiða gøtuna fyri nýggjum vinnutiltøkum, til at útbyggja samskiftiskervi og til at menna útbúgving og gransking. Og tað hevur munað meiri enn einki. Íslendski búskapurin er nógv fjølbroyttari nú enn fyrr, leysari av fiskivinnu og hevdbundnum vinnugreinum, eitt nú landbúnaði. Hóast tað er búskaparliga streymskiftið uttanlands, ið hevur givið íleiðing til ta nýskipan, sum er hend í Íslandi tey seinastu tjúgu árini, so er tó eingin ivi um, at tilgongdin allar vegir hevur samsvarað við hugmyndafrøðina hjá Sjálfstæðisflokknum.

Hinvegin eru hugmyndirnar um marknaðarbúskap og vinnufrælsi vorðnar hvørsfloksogn hesi seinastu árini (sjálvt á javnaðarveinginum), og tað er óivað ein meginorsøk til, at Sjálfstæðisflokkurinn er farin at leggja upp aftur meiri fyri seg í vælferðar- og umhvørvismálum, enn hann áður hevur gjørt. Hetta kom skilliga fram í røðuni, sum Geir H. Haarde floksformaður helt, tá ið 37. landsfundurin hjá Sjálfstæðisflokknum varð settur í Laugardalshøllini í Reykjavík 12. apríl. Geir H. Haarde legði í røðu sínari dent á vælferð, umhvørvi og útbúgving. Hann nevndi serliga korini hjá eftirlønarfólki. Arbeitt varð longu, segði hann, við at tryggja øllum eftirlønarfólki sømiliga lágmarksinntøku, antin tey hava trygt sær rætt til útgjald úr eftirlønargrunnum ella ikki. Floksformaðurin skeyt eisini upp, at tey sum eru farin um hálvfjers kunna fáa sær lønt arbeiði, um tey vilja og orka, uttan at slík inntøka skal mótroknast í fólkapensjón teirra. Vælferðin var tó ikki sjálvgivin. Hon verður ongantíð meiri, segði Geir Haarde, enn virðisskapanin í samfelagnum er til, men sum var gav fíggjarstøðan hjá ríkiskassanum betur vælferðarlíkindi enn mangan áður.

## Sjálfstæðisflokkurinn í mun til aðrar flokkar

Munurin millum Sjálfstæðisflokkinn og flokkarnar í andstøðuni í Altinginum koma fram á ymsan hátt. Tað sum fyrst og fremst skilur Sjálfstæðisflokkinn og størsta andstøðuflokkin í farandi valskeiði, Samfylkingina, er, umframt ymiskar áherðslur í búskapar-, fíggjar- og vælferðarpolitikkinum, serliga støðan til ES. Samfylkingin vil taka upp samráðingar við ES um treytir fyri íslendskum limaskapi.

Í mun til VG (Vinstrihreyfingin-Grænt framboð) eru tað serliga umhvørvið, sum ber í millum, og stóriðnaðarmálini (ætlanir eru t.d. um at geva loyvi at byggja fleiri orkukrevjandi alminium-verksmiðjur), men tó eisini sum vera man viðvíkjandi búskapar- og vælferðarmálum.

Frjálslyndi flokkurinn (Liberali flokkurin), ið útbrótarar úr Sjálfstæðisflokknum við Sverri Hermanssyni á odda stovnaðu í 1998, finst serliga at fiskivinnupolitikkinum. Flokkurin vil hava kvotakervið burtur og eina fiskidagaskipan setta í staðin. Í seinastuni hevur Frjálslyndi flokkurinn gjørt seg til talsmenn fyri ein útlendingapolitikk, sum í mongum er átøkur tí hjá Dansk Folkeparti. Allir aðrir flokkar, eisini Sjálfstæðisflokkurinn, eru samdir um at siga henda politikk burtur.

➘